# Nýggja vatnleiðing

Landsverk er í ferð við at gera landsvegin út til Oyrar av nýggjum, og tí hevur Sunda kommuna valt at brúka hetta høvið til at leggja nýggja vatnleiðing til bygdina. Talan er um teinin frá bátahylinum á Oyrarbakka og út til Oyrar ella umleið ein kilometur. Menn hjá kommununi gera arbeiðið, sum kostar umleið 300.000 krónur. Í sambandi við vegagerðina leggja menn hjá Landsverki eisini nýggjan kaðal til gøtuljósini suðureftir.



# Guds bankamaður í Miðlahúsinum

Í morgin klokkan 20 kemur George El Khoury at hava fyrilestur í Miðlahúsinum. George er vorðin kendur sum "Guds bankamaður". Hann er føddur og uppvaksin hjá fátækari familju í Libanon. Hann stríddi seg fram í lívinum og endaði við at gerast ríkur og kendur bankamaður, eftir at hann hevði ment eina nýggja lánsskipan.

Hann broytti sítt lív í marglæti, tá ið hann gjørdist kristin. Nú ferðast hann runt og greiðir frá um lív sítt og trúgv sína. Hann er goftur aftur við konu sínari, sum hann rýmdi frá fyri nógvum árum síðani. Tey bæði reka eina kirkju og eina kristiliga sjónvarpsrás í heimlandinum Libanon.

Tilmæli frá PISA-arbeiðsbólki:

# Lækkið skúlaaldurin og hækkið tímatalið




*Olaus Jespersen, formaður í bólkinum, greiddi frá uppskotinum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Børn skulu í skúla sum seks ára gomul og tey skulu eisini hava fleiri tímar enn 1. flokkur hevur í dag. Tað eru nøkur av teimum 45 tilmælunum, sum PISA-arbeiðsbólkurin er komin við í álitunum, sum varð handað í dag**

PISA-TILMÆLI
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

13. juli í ár varð ein arbeiðsbólkur settur, sum skuldi koma við einum uppskotið um, hvussu vit fáa broytt og bøtt um vánaligu úrslitini sum PISA-kanningin vísti.

Í dag varð uppskotið, um at styrkja fakliga førleikan hjá næmingunum og at menna fólkaskúlan, handað landsstýrismanninum í mentamálum, Jógvani á Lakjuni.

Tað var Olaus Jespersen, formaður í bólkinum, sum greiddi frá uppskotinum. Hann legði fyri við at vísa á, hvat PISA kanningin vísti.

Førleikin í lesing, náttúru/tøkni og støddfrøði var ov vánaligur, men næmingarnir trívast í skúlunum og lesa eisini fleiri avísir enn aðrastaðni.

## 6 ára gomul í skúla

Jógvan á Lakjuni greiddi frá, at arbeiðsbólkurin er settur saman av so nógvum ymiskum, fyri at fáa so nógvar ymsar vinklar á málið sum gjørligt.

Eisini hava fólk uttan fyri arbeiðsbólkin verið við á fundum. Millum annað ein næmingur, umboð fyri pedagogarnar og eisini útlendskir serfrøðingar.

Uppskotið er eisini merkt av tí, at tað eru nógv fólk, sum hava stungið høvdini saman, tí tað eru onki minni enn 45 tilmæli, sum ein samdur arbeiðsbólkur er komin við.

Millum mest kollveltandi tilmælini var skúlaaldurin skal lækkast frá sjey ár til seks ár.

– Vit síggja næstan alla aðrastaðni, at børn fara í skúla sum seks ára gomul, og tí er tað væl natúrligt, at vit eisini lækka skúlaaldurin her heima, sigur Jógvan á Lakjuni, sum tekur undir við hesum tilmælinum frá bólkinum.

Bólkurin mælir til, at skúlaaldurin verður lækkaður frá 2008, men hetta dugdi landsstýrismaðurin ikki at ímynda sær, um tað lat seg gera ella ikki.

Ein onnur broyting sum bólkurin mælir til er, at hækka tímatalið hjá teimum fyrstu flokkunum, t.v.s. 1.-3. flokk. Í dag hava næmingar í 1. flokki umleið 18 tímar um vikuna, men verður tilmæli fylgt, so skal 1. flokkur hava 25 tímar um vikuna.

Í samband við at skúlaaldurin verður lægri, er ætlanin eisini, at skiftið frá barnagarði til skúla verður samskipað betri. Í dag eru barnagarðar og skúlar, sum hava eitt ávíst samstarv, men hetta skal nú formaliserast, soleiðis at vit fáa eitt slag av innslúsingarskipan frá barnagarði til skúla, og báðir partar eru fyrireikaðir upp á, hvat tað er teir møta.

Eisini verður mælt til, at dagstovnaøkið verður lagt undir mentamálaráðið.

## 10 ára undirvísingarskyldu

At skúlaldurin lækkar merkir ikki, at næmingurin sleppur upp aftur yngri úr skúlanum enn hann ger í dag. Undirvísingarskyldan verður tíggju ár, og til tey sum tá ikki eru klár at fara víðari á ein miðnámsskúla, má eitt annað tilboð finnast til, varð sagt á fundinum.

Fyri at hækka støði hjá næmingunum og at øll skulu virka undir somu treytum, er ætlanin at gera landsroyndir fyri allar næmingar. Landsroyndirnar koma aftrat fráfaringarroyndunum, og skulu geva næmingum, lærarum, foreldrum og myndugleikum upplýsing um fakliga støði, trivna, arbeiðslag og annað í skúlanum.

Soleiðis ljóða nøkur av tilmælunum, sum arbeiðsbólkurin er komin við, og fleiri teirra kunnu síggjas aðrastaðni á síðuni.

## FAKTA

**Tilmæli hjá bólkinum er hetta:**

- Dagstovnaøkið verður lagt undir Mentamálaráðið
- Skiftið frá barnagarð til skúla verður samskipað betri
- Børn fara í 1. flokk tá tey eru seks ára gomul
- Fleiri tímar eiga at verða settir av til føroyskt á tímatalvuni fyrstu árini í skúlanum
- Hvønn dag eiga allir næmingar at lesa 20 minuttir í skúlanum. Næmingar í 1. og 2.floggi eiga somuleiðis at skriva hvønn dag í 20 minuttir.
- Skipað fyri lesiskeiðum, lesidøgum, ella –vikum, har innihaldið er tillagað eftir, hvørjum lesistigi næmingurin er á.
- Skipað verður fyri ráðlegging í lesing um hvønn einstaka næming við støði í kanningum og eygleiðingum, ið serlærarin/lærarin í føroyskum hevur gjørt.
- Skipað verður fyri almennum lesiátaki.
- Økt játtan til bókaútgávu.
- Nútímans telduútgerð í skúlanum.
- Seta í verk full eftirmetingarskipan, sum umfatar næmingaeftirmeting, landsroyndir, støðuroyndir.
- Seta í verk kanningar av undirvísingini.


# Frá Javnaðarflokkinum

Mint verður á landsfundin, ið verður í bygdahúsinum í Miðvági. Fundurin byrjar fríggjakvøldið kl. 19.30 og heldur fram leygarmorgunin kl. 9.00.

***Skrá fyri fundin:***

**Fríggjadagin 20. okt. 2006**

| | |
|---|---|
| kl. 19.30 | Fundurin verður settur |
| | Skrivarafrágreiðing |
| | Frágreiðing frá limafeløgunum |
| | Tónleikur |

**Leygardagin 21. okt. 2006**

| | |
|---|---|
| kl. 9.00 | Morgunmatur |
| kl. 9.30 | Formansfrágreiðing |
| | Kjak um formansfrágreiðingina |
| kl. 13.30 | Gestarøðari |
| | Tema orðaskifti |
| kl. 17.30 | Matlig hugnaløta |

***Møti fjølment***

**Javnaðarflokkurin**